**10 TING** UM

# Flemming Østergaard

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



# Stríddi seg aftur á føtur

HANN FEKK AT VITA, AT HANN KUNDI ONGANTÍÐ GANGA AFTUR, MEN HANN NOKTAÐI AT GÓÐTAKA DÓMIN FRÁ LÆKNUNUM. HER ERU UPPLÝSINGAR UM **FLEMMING ØSTERGAARD**, SUM Í NÓGV ÁR VAR STJÓRI HJÁ TODI JÓNSSON Í **FC KEYPMANNAHAVN**.

1 Hann er 66 ára gamal, giftur og eigur tveir synir – Nikolai og Peter.

2 Fyrst í 1990'unum fóru fjepparar at kalla hann Don Ø, og við tíðini hevur hann vant seg við navnið. Hann hedlur, at ein vissur týdningur verður lagdur í eitt slíkt navn, og hann kann finna upp á at undirskriva seg Don Ø.

3 Kelinavnið Don Ø er nú eitt skrásett vørmerki hjá Patent- og Varemærkestyrelsen

4 Østergaard hevur útbúgving frá keypsskála, og hann hevði egin virki – eitt nú Føma Kontorsystemer, og hann átti í Kinnarps Kontormøbler.

5 **Í 1994 blandaði Østergaard seg av álvara upp í fótbólt, tá ið hann yvirtók Lyngby, har eitt nú Todi Jónsson var ein av spælarunum.**

6 Í 1996 flutti Østergaard til FC Keypmannahavn, sum hann síðani hevur verið ímyndin av. Tá ið hann flutti felag var Todi Jónsson ein av spælarunum, hann tók við sær.

7 Í 2002 gavst Østergaard sum stjóri í FCK – ella felagnum Parken Sport & Entertainment A/S – men síðani hevur hann virkað sum nevndarformaður.

8 Í 1980'unum var hann í einari ferðsluvanlukku og fekk álvarsaman skaða í beinini. Læknarnir søgdu honum, at hann ongantíð aftur fór at ganga. Men hann noktaði at viðurkenna seg og vandi beinini hjá sær, so hann aftur kundi fara á føtur og ganga.

9 Í 2007 gjørdist Østergaard nevndarlimur í donsku sjónvarpsstøðini TV2.

10 Árini frá 2005 til 2008 fekk Flemming Østergaard 30 milliónir krónur fyri sítt arbeiðsavrik í Parken – tað var meira enn tvífalt so nógv sum nevndarformaðurin fyri AP Møller-Mærsk fekk somu ár.

## SITAT



Eingin kann fara aftur og byrja av nýggjum, men øll kunnu byrja í dag og fáa ein nýggjan enda.

***Maria Robinson***

## MIÐLARNIR OG EG



Í nýggja táttinum siga kendir og ókendir persónar frá síni miðlanýtslu.

PLÁTUVENDARIN OG BLAÐMAÐURIN **LEIF LÁADAL** LESUR BO BEDRE OG HYGGUR EFTIR BLACKADDER. LEIF NÝTIR NETIÐ TIL NÆSTAN ALLA SÍNA MIÐLANÝTSLU.

**MÍTT BLAÐ**
Sosialurin, Dimmalætting, Oyggjatíðindi, Norðlýsið og Gratisavísin.

**MÍN HEIMASÍÐA**
Portal.fo, vagaportal.fo, dimma.fo, nordlysid.fo, politiken.dk, kramm.fo, grams.fo, plagg.fo, mess.fo og regluliga einar fimti aðrar, umframt tað leysa.



**MÍN TÓNLEIKUR**
Beint nú er favoritturin ókeypis podcast download chill-tónleikur frá www.loungecast.net. Annars dámar mær nógv sløg av tónleiki og royni at fylgja við tí, sum hendir á føroyska og partvís útlendska tónleikapallinum. Nýggjastu útgávurnar hjá Guðrið Hansdóttir og Teiti eru super, og »nýggi« Marius og Páll Finnur Páll eru kul á palli. Jazzur er altíð góður – serliga sendingarnar hjá Leivi Thomsen.

**MÍTT SOSIALA NETVERK**
Facebook – bæði mín egni profilur, og tann hjá Kramm.fo á Facebook. Annars er eitt nýtt føroyskt netverk ávegis fyri fólk, sum hava áhuga fyri, og arbeiða við og á internetinum. Tað gleði eg meg til.




**MÍN DVD**
Skal eg navna nakrar, so Breaking the Waves, La vita è bella, The Shawshank Redemption, Down by law og Usual Subjects. Men tað eru eisini nógvir aðrir yndisfilmar.

**MÍTT MAGASIN**
Beint nú: Bo Bedre.

**MÍN SJÓNVARPSRØÐ**
Blackadder. (ókeypis á netinum á http://video.google.com)

**MÍN BÓK**
New York Triology hjá Paul Auster og nógvar aðrar.



**MÍTT ÚTVARP**
ÚF, Rás2, tær ymsu DR rásirnar (á netinum), umframt allar møguligar aðrar netrásir, m.a. frá iTunes.

**MÍN TELEFON**
Ein nærum fýra ára gomul Sony Ericsson, sum riggar fínt.

**HVAT VIL TÚ IKKI BRÚKA MIÐLATÍÐ UPPÁ?**
Lesið og hyggið eftir so at siga øllum.

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
At teir almennu miðlarnir hava loyvi til at selja lýsingar og samstundis »seta fólk í geglið«, um tey ikki betala lurtara- og hyggjaragjald fyri nakað, sum tey kanska hvørki lurta ella hygga eftir.

**HVAT VIL TÚ HAVA MEIRI AV Í MIÐLUNUM?**
Eg vil ikki hava meira, men minni. Tað hevði bøtt um dygdina.

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos